# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit skulu hava álit á okkara búskapi, tí sum frá líður fara vit eisini at vinna á hesari avbjóðingini*
*(George W. Bush)*



*Nú ljóðar, at útlendskir leiguhermenn gera seg inn á mótstøðufólk hjá Robert Mugabe, forseta (Mynd: Polfoto)*

# Ljóðar frá ræðuleikum í Zimbabwe

**Sambært bretska blaðnum The Independent eru útlendskir leiguhermenn komnir til Zimbabwe, har teir gera seg inn á politisk mótstøðufólk**

Eygnavitni, sum The Independent hevur tosað við, hava greitt frá, at teir fremmandu leiguhermenninir fara sera harðliga fram ímóti fólki, sum styðja andstøðuflokkin MDC og leiðara hansara, Morgan Tsvangirai. Blaðið sigur seg eisini hava fingið vissu fyri, at vápnaðir bólkar, sum arbeiða saman við zimbabwiska stjórnarherinum, hjálpa teimum útlendsku leiguhermonnunum.

The Independent skrivar frá eygnavitnum, at leiguhermenninir eru eirindaleysir.

– Vit hava fingið upplýsingar um, at teir fremmandu leiguhermenninir tosa eitt mál, sum okkara fólk ikki skilja, og at teir skilja heldur ikki okkara mál. Vit hava eisini fingið at vita, at teir eru púra eirindaleysir, og at tað finnast fleiri dømi um, at teir hava stungið eyguni út á fólki og skorið tunguna og kynslutir av teimum, sigur eitt umboð fyri ein mannarættindafelagsskap við bretska blaðið.

### Úr Rwanda

Hetta er fyrstu ferð, at tað ljóðar frá útlendskum leiguhermonnum í Zimbabwe, men tað er ikki heilt greitt, hvørjum landi teir eru úr. Ein mannarættindafelagsskapur í Zimbabwe sigur fyri The Independent, at teir fremmandu hermenninir eru ikki úr grannalondunum hjá Zimbabwe. Felagsskapurin heldur, at leiguhermenninir eru úr Rwanda, Kenya ella Uganda.

Lokalar keldur vilja vera við, at leiguhermenninir eru úr Rwanda, og at talan er um hutuar, sum vóru uppi í fólkamorðinum í Rwanda í 1994. Men zimbabwiski mannarættindafelagsskapurin ger vart við, at tað finnast eingi prógv fyri, at so er.

# Russisk herskip aftur við Svalbard

**Russiska tíðindastovan Novosti visti í gjár at siga, at russisk herskip eru aftur á leiðunum við Svalbard**

Ein almennur embætismaður sigur við tíðindastovuna, at Russland viðurkennir ikki 200 fjórðina markið, sum norðmenn hava lýst kring Svalbard. Sambært Novosti er herskipið "Severomosk", ið er serútgjørt til at leita eftir kavbátum, á Svalbard-leiðini, og seinni í vikuni kemur hjálparskipið "Marshal Ustinov" eisini á leiðina.

Noreg og Russland hava fleiri ferðir verið á rokinum um ræðisrættin á leiðini við Svalbard. Í 2005 rýmdi ein russiskir trolari við tveimum norskum eftirlitsmonnmum umborð, og so seint sum tann 27. mai í ár róku norsk sjóverjuskip tveir russiskar trolarar av leiðini við Svalbard.



## STUTT SAGT

### Obama hartar Bush

Forsetavalevnið hjá demokratunum í USA, Barrack Obama, segði í gjár, at leypa yvirgangsmenn á USA eina ferð afturat, er tað rættiliga sannlíkt, at tað álopið fer at verða lagt til rættis í Afghanistan eins og álopið tann 11. september í 2001. Obama segði, at USA átti at lagt nógv størri dent á at fáa frið í Afghanistan enn í Irak, og hann hartaði George W. Bush, forseta og stjórn hansara fyri at hava sent fimm ferðir so nógvar hermenn til Irak sum til Afghanistan. Samstundis vísti hann á, at al-Qaeda hevur ment seg nógv í Pakistan og hevur limir kring allan heimin. Barracvk Obama heldur, at John McCain fer at gera somu mistøk sum Bush, skuldi tað hent, at hann verður forseti.



*Barrack Obama hartar Bush, forseta (Mynd: AP)*

### Eitur í frukt

Ein kanning hjá norska matvørueftirlitinum hevur víst, at tað er nógv eiturevni í nógvum av teimum fruktunum, sum vit innflyta úr heitari londum. Millum annað vísti kanningin, at í paprika úr Turkalandi, salati úr Italia, bønum úr Egyptalandi og ananas úr Costa Rica er meiri av eiturleivdum, enn reglurnar áseta. Kortini er ikki talan um so nógv eiturevni, at fólk fáa varandi mein av at eta tað, men hinvegin kunnu tey fáa trupulleikar so sum høvuðpínu og vøddamøði eina løtu. Kanningarnar vístu, at tað er eisini í meira lagi av eiturleivdum í summum norskum fruktum, men kortini munandi minni enn í teimum innfluttu, skrivar Nationen.



*Tað eru nógv eiturevni í nógvum fruktu (Mynd: Aftenposten)*